# Betesdakórið til Noregs

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og útsynningi og sólglottar, men av og á sirm og mjørki. Hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Stívt andøvsgul av vestri, men út á dagin minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig. Sunnudagin upp í hvassan vind av suðri og regn. Hitin millum 10 og 13 stig.

*Betesdakórið í Klaksvík fer í dag til Noregs, har tey skulu vitja í eina viku. Tey fara at syngja í ymsum fríkirkjum, og tey vitja eisini norksu statskirkjuna*



**Kórið hjá samkomuni Betesda í Klaksvík verður í ár 75 ár. Í dag fara til Noregs, har tey skulu syngja ymsastaðni komandi vikuna**

KÓR
*Eyðun Klakstein*

Í 1920 varð kórið í Betesda í Klaksvík stovnað, og síðani hevur kórið verið virkið øll árini. 1. oktober eru tað tí liðin 75 ár, síðani kórið sang sínar fyrstu sangir.

Í dag fer Betesdakórið til Noregs, har tey skulu vitja á leiðini við Stavanger og Haugesund. Har fara tey at vitja í ymsum fríkirkjum, og onkur vitjan verður eisini í statskirkjuni.

Á ferðini til Noregs verður eisini Poul Færø, sum skal tala á teimum ymsu støðunum, kórið vitjar.

Kórið í Bestesda telir 60 fólk, men á ferðini til Noregs verða tey 32 fólk. Leiðari hjá kórinum er Jógvan við Keldu, og hann hevur verið leiðari seinastu 37 árini.

**Hava vant nógv**

Hetta er langt frá fyrstu ferð, at Betesdakórið er á ferð uttanlands. Uttanlandsferðirnar byrjaðu í 1946, tá manskórið í Betesda var í Danmark og sang.

Har vóru upptøkur eisini gjørdar við kórinum, og tað var ókent millum føroysk kór tá.

Síðani hevur Betesda kórið verið fimm ferðir í Danmark, tey hava vitjað Ísland tvær ferðir, og í 1987 vóru tey á vitjan í Sveis.

Betesdakórið ætlar eisini at geva eina fløgu út, og ætlanin er, at hendan fløgan skal koma út næsta ár.

Á ferðini til Noregs fer Betesdakórið at syngja á bæði føroyskum og norskum. Jógvan við Keldu, kórleiðari, sigur, at tey hava vant nógv seinastu tíðina, og kórið er sera væl fyri, nú tey fara til Noregs.

Betesdakórið verður á ferð í Noregi í eina viku.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 6 |
| Nuuk | 6 |
| Qaqortoq | 10 |
| Ammassalik | 9 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 19 |
| London | 22 |
| Tromsø | 10 |
| Bergen | 13 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 17 |
| Keypmannah. | 20 |
| Helsinki | 19 |
| Moskva | 21 |
| Berlin | 17 |
| Warzawa | 21 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 20 |
| Paris | 25 |
| Madrid | 30 |
| Róm | 26 |
| Malorca | 30 |
| Athen | 30 |
| Malta | 29 |
| Tunis | 29 |
| Beijing | 29 |
| New Dehli | 25 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 17 |
| New York | 26 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | 32 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 18 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 988 hPa. sunnan fyri Ísland stendur í stað og grynnist.




Lágtrýstið sunnan fyri Ísland fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður nær Føroyum hósdagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 13/08 kl. $06^{00}$– 14/08 kl. $06^{00}$. Hitin í gjár: 11,2°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 15,0 mm – mált frá 13/08 kl. $06^{00}$– 14/08 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í aug.: 61,4 mm


BILLUTIR

ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR

F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666



Spf.
…hvør sigur at vit eru sum onnur?
HESTPRENT
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo


## VESTFALLSKYRRINDI

12. august: Seinna kvarter
19. august: Tendring/Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 15. aug | 03.50 | 16.17 | 02.50 | 15.17 | 03.05 | 15.32 | 05.50 | 18.17 | 06.50 | 19.17 | 02.05 | 14.32 |
| 16. aug | 04.45 | 17.13 | 03.45 | 16.13 | 04.00 | 16.28 | 06.45 | 19.13 | 07.45 | 20.13 | 03.00 | 15.28 |
| 17. aug | 05.41 | 18.10 | 04.41 | 17.10 | 04.56 | 17.25 | 07.41 | 20.10 | 08.41 | 21.10 | 03.56 | 16.25 |
| 18. aug | 06.38 | 19.06 | 05.38 | 18.06 | 05.53 | 18.21 | 08.38 | 21.06 | 09.38 | 22.06 | 04.53 | 17.21 |

| Dagur | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 15. aug | 01.05 | 13.32 | 04.05 | 16.32 | 05.05 | 17.32 | 03.35 | 16.02 | 04.50 | 17.17 |
| 16. aug | 02.00 | 14.28 | 05.00 | 17.28 | 06.00 | 18.28 | 04.30 | 16.58 | 05.45 | 18.13 |
| 17. aug | 02.56 | 15.25 | 05.56 | 18.25 | 06.56 | 19.25 | 05.26 | 17.55 | 06.41 | 19.10 |
| 18. aug | 03.53 | 16.21 | 06.53 | 19.21 | 07.53 | 20.21 | 06.23 | 18.51 | 07.38 | 20.06 |